# Kappríðing á Ólavsøku



Tilmelding til kappríðingina í Marknagili ólavsøkudag kl. 14.00 er á tlf. nr. 314500, 421643 ella 219098 til mikudagin 24. juli kl. 19.00.

Ríðararnir skulu nýta hjálm.

**Føroya Ríðingarfelag**

---

**Fiskiveiðieftirlitið**

# Maskinmeistarar

Tvey størv sum maskinmeistarar á skipum okkara eru leys at søkja.

Til størvini krevst maskin útbúgving, vinnubræv, heilsuváttan fyri sjómenn og læknakanning fyri roykkavarar.

Kavaraútbúgving er ein fyrimunur, tó eingin treyt.

Løn-, arbeiðs- og setanartreytir sambært sáttmála millum fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið.

Umsøknir við prógvum og viðmælum skulu sendast til

**Fiskiveiðieftirlitið**
Postsmoga 347
110 Tórshavn

í seinasta lagi 22. august 2002.

---

FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ
**Føroya Gjaldstova**
Traðagøta 39 . Postsmoga 2009 . FO-165 Argir . Føroyar

# Størv í bókhaldinum á Føroya Gjaldstovu

Tvey størv í bókhaldinum á gjaldstovuni eru leys at søkja.

Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðsheitum:
- skráseting av kreditorum,
- skráseting av útlendskum gjaldoyra,
- skráseting av afturvendandi rokningum,
- skráseting í høvuðsbókhaldi,
- avgreiða fyrispurningar m.a. um útgjaldingar,
- vegleiða stovnar í ymsum fyrispurningum,
- leita fram skjøl og arkivera.

Viðkomandi kann verða settur til onnur arbeiði innan roknskaparhaldið, um leiðslan metir hetta verða neyðugt.

**Krøv til størvini:** Hægri handilsskúli e.t. og/ella viðkomandi arbeiðsroyndir. Tað týdningarmesta er, at viðkomandi skilir væl bókhald, hevur góðan ordan í sínum arbeiði og hevur lætt við at hava yvirlit. Arbeiðið á stovninum er í stóran mun skipað í bólkum. Tí skulu tey, ið verða sett, hava góð samstarvsevni og gera sítt til, at bólkurin arbeiðir væl saman.

Gjaldstovan kann bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har tað verða brúkt framkomin EDV-amboð.

**Setanarviðurskifti:** Arbeiðstíðirnar eru 30 tímar um vikuna, og størvini eru lønt samb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í Bólki II. Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Jákup Augustinussen, sum er a hitta á tlf. 214960.

**Umsókn:** Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða sendar til Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 2. august 2002.

*Á Gjaldstovuni starvast 30 fólk. Gjaldstovan rekur, viðlíkaheldur og mennir Búskaparskipan landsins. Gjaldstovan førir roknskap yvir játtanirnar á fíggjarlógini og førir m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld lankskassans.*

*Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum.*

---

**Í BÝIN**
– HVØNN HÓSDAG

---



ALV
Sølubúðin á vaglinum

## Til Ólavsøku hava vit ymiskt til tann føroyska búnan

*Troyggjur* til mansbúnan
*Hosur og hosubond* í ymsum litum
*Rotuskógvar*
*Fyrikl. / turriklæði,* vovin, ymsar litir
*Stór bundnaturriklæði,* svørt við reyðari rangu,sera flott

*Eisini hava vit:*
*Morreyðar troyggjur til børn og vaksin*
*Ymiskt prýði úr gulli, silvuri og føroyskum steini*
*Bundnaturriklæði, eitt- og tveytráða, í ymsum støddum og litum*
*Troyggir og hálvhosur til sjómannin*



**ALV Sølubúðin**
**tlf. 313667**

---

HESTPRENT



**BØKUR, BØKUR, BØKUR**
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

---

# Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Skrivstovustarv

**Starvslýsing**
Til skrivstovuna á Heilsufrøðiligu starvsstovuni er eitt skrivstovustarv leyst at søkja.

Starvið, sum er fulla tíð, fevnir um vanligt skrivstovuarbeiði, sosum:

- Journalisering
- Bókhald í Fíggjarskipan Landsins
- Skráseting í journalskipanini í.s.v. málsviðgerð, herundir klárgera mál til avgreiðslu
- Móttøka av sýnum
- Rættlestur
- Telefon- og postavgreiðsla
- og mangt annað, ið hoyrir skrivstovuyrkinum til.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt hava yrkisútbúgving í skrivstovuyrkinum. Arbeiðsroyndir er ein fyrimunur, og tú skalt vera stinn/-ur í føroyskum.

Kunnleiki til og royndir við at nýta miðsavnaðar EDV-skipanir, ið vanliga verða nýttar á skrivstovum, er ein treyt.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærløgd/ nærlagdur, duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt og tola stóra arbeiðsbyrðu.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Tú skalt kunna byrja í starvinum seinast 1. oktober 2002, tó best um tú kanst byrja sum skjótast.

Starvið verður lønt í 3. lønarflokki sambært sáttmála við Starvsmannafelagið, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo.

**Umsóknin**
Umsóknir til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 5. august 2002.

Vegna summarferiu á stovninum til og við 5. august 2002 fæst best samband við stovnin við at senda telefaks á 35 64 01 ella senda teldubræv til akijac@hfs.fo og síðani kontakta vit teg. Annars verður víst til heimasíðuna hjá okkum, www.hfs.fo.

**Skrivstovan á Heilsufrøðiligu starvsstovuni**
Skrivstovan á stovninum virkar sum tænastudeild fyri allan stovnin. Á skrivstovuni eru 2 skrivstovufólk, ein skrivstovunæmingur og eitt teldufólk. Í dagliga arbeiðinum á skrivstovuni verða miðsavnaðar telduskipanir nýttar.

Skrivstovan heldur til á tveimum adressum, bæði á Falkavegi og á Debesartrøð.

---

# Jørð í Sandvík til sølu

Um nóg gott boð fæst, er eitt dyrkað jarðarstykki upp á slakar 3.000 fermetrar í Sandvík til sølu. Stívliga fýra gyllin uttangarðs í Sandvíkarhaganum fylgja við.

Skriva til:
**Sosialurin**
box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 220

---

Lýsið við brúktum bilum



---

# Summarfrí

Frá mánadegnum 5. august til og við fríggjadagin 23. august er skrivstovan stongd vegna summarfrí.

**Havnar Handverkarafelag**

---

**Verkstaðið Vón**

# Summarfrí

Frá fríggjadegnum 26. juli til mánadagin 19. august 2002 er stongt vegna summarfrí.

**Verkstaðið Vón**
Tlf. 314288 · Fax 315329

---

# Gøtu Stevnan
## 19. 20. og 21. juli

**Fríggjadagin 19. juli**

| | |
|---|---|
| kl. 15.00 | Blásastova hevur opið til kl. 17.00 |
| kl. 16.00 | Listaframsýning og café í Glyvrahanusarhúsið til kl. 18.00 |
| kl. 19.00 | Grót skipar fyri stórari koncert á Gøtusandi við: • Clickhaze • MC-Hár • Hanus G. Johansen • Enekk • Søren Søgaard • Desislava & Valeri Dimchevi úr Bulgaria |
| kl. 19.00 | Paintball í grótbrotinum í Norðragøtu |
| kl. 20.00 | Tivoli opnar á Oyruni |
| kl. 20.00 | FOK hevur ting loppumarknað á Oyruni |
| kl. 23.00 | Føroyskur dansur og café í Losjuni |
| kl. 24.00 | Midnáttarsamkoma í Filadelfia |

**Leygardagin 20. juli**

| | |
|---|---|
| kl. 9.00 | GÍ - KÍ Smápiltar |
| kl. 9.00 | GÍ - EB/Streymur Pinkur |
| kl. 10.00 | GÍ - NSÍ Undir 7 ár |
| kl. 10.00 | GÍ - NSÍ Piltar |
| kl. 11.00 | GÍ - NSÍ Gentur 10 - 12 ár |
| kl. 11.00 | GÍ - NSÍ Smágentur |
| kl. 12.00 | GÍ - LÍF Smádreingir hálvan vøll |
| kl. 14.00 | Listaframsýning og café í Glyvrahanusarhúsið til kl. 19.00 |
| kl. 14.00 | Motorcross fyri børn við fótbóltsvøllin til kl. 20.00 |
| kl. 15.00 | Blásastova er opin til kl. 17.00 |
| kl. 15.00 | Tivoli opnar á Oyruni |
| kl. 15.00 | FOK hevur ting loppumarknað á Oyruni |
| kl. 15.00 | Fótbóltsdystur millum FM GÍ ´93 og FM B68 ´92 - steypadystur |
| kl. 15.00 | Angela og klovnar undirhalda í Losjuni |
| kl. 17.00 | Tiltak á kajuni - kappróður millum virkir í gummibátum og skemt |
| kl. 18.00 | Køkutombola á tivoliøkinum |
| kl. 18.30 | Paintball í grótbrotinum í Norðragøtu |
| kl. 19.00 | Fótbóltsdystur millum 1. deild kv. GÍ og U-19 kvinnulandsliðið - steypadystur |
| kl. 23.00 | Sangur á Oyruni |
| kl. 23.30 | Edmund Joensen flytur fram røðu - Felagssangur |
| kl. 23.30 | Dansur og konsert við Frændum á Kambsdali |
| kl. 23.30 | Bálið verður tendrað |
| kl. 24.00 | Fýrverkarí |

**Sunnudagin 21. juli**

| | |
|---|---|
| kl. 11.00 | Gudstænasta |
| kl. 11.00 | Familjumøti í Filadelfia |
| kl. 14.00 | Listaframsýning og café í Glyvrahanusarhúsið til kl. 19.00 |
| kl. 14.00 | Motorcross fyri børn við fótbóltsvøllin |
| kl. 15.00 | Tivoli opnar á Oyruni |
| kl. 15.00 | FOK hevur ting loppumarknað á Oyruni |
| kl. 15.00 | GÍ - EB/Streymur 1. deild menn - steypadystur |
| kl. 15.00 | Blásastova er opin til kl. 19.00 |
| kl. 16.00 | Bingo í Høllini á Kambsdali |
| kl. 17.00 | Paintball í grótbrotinum í Norðragøtu |
| kl. 17.30 | GÍ 3. deild - ÍF 2. deild menn - steypadystur |
| kl. 19.30 | Filadelfia hevur útimøti á Oyruni |
| kl. 21.00 | Grót skipar fyri koncert í Losjuni við: • Blues Valentin Trio • Sólin og Regnið v/ Teiti Lassen |

---

Sosialurin
Bilar · Lýsingar · Tíðindi · Viðmerkingar · Ítróttur · Nøvn · Skráir · Tiltøk